Ítróttar
Sosialurin

Nr. 68 • mikudagur • 5. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gólvið er ræðuligt



*Teir báðir føroysku venjararnir høvdu hug at ilskast um hallargólvið, sum teir hildu vera beinleiðis vandamikið*

**Svein Rógvi Nielsen var alt annað enn nøgdur við spæliumstøðurnar hjá landsliðnum, tá vit prátaðu við hann eftir fyrstu venjingina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er í nógvar mátar um eitt land, har tíðin partvís hevur staðið still. Umframt at vera merkt av hørðu bardøgunum, sum hava herjað landið seinastu 15 árini, tykist Bosnia eisini at vera nakað afturúrsiglt, tá hugsað verður um forkelandi karmarnar, sum stórur partur av vesturheiminum er vanur við. Kanska einamest sjónligt við gomlu útgávunum av Seat og VW, sum koyra runt á slitnu landavegunum.

**Gólvið ein katastrofa**

Eftir venjingina týsmorgunin tosaðu vit við annan av føroysku venjarunum, Svein Rógva Nielsen, og hann læt sum heild hampuliga væl at umstøðunum. Í øllum førum, tá tosað varð um gistingarhúsið, sum liðið býr á.

– Men vøllurin er ein skandala. Fjalarnar í gólvinum eru somikið ójavnar, at tað kann vera beinleiðis hættisligt, um spælarar skreiða eftir gólvinum.

Men er tað ikki ein fortreyt, sum er tann sama hjá øllum liðunum í kappingini?

– Sjálvandi. Men missa vit ein spælara av onkrum somikið býttum skaða, so er tað sera harmiligt.

Ójavna gólvið gav eisini úrslit í, at uppspringið hjá bóltinum var misjavnt kring høllina. Men tað var nú ikki nakað, sum tóktist órógva Rógva.

– Í so máta er hatta ikki verri, enn tað er í KÍ-høllini, so tí partinum eri eg ikki so bangin fyri, staðfesti hann at enda.

## Fyrsti dysturin er í dag

**Klokkan 15 lokala tíð í dag skuldi føroyska kvinnulandsliðið spæla sín fyrsta dyst í Challenge Trophy-kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu klokkan 6.45 varð landsliðið purrað út týsmorgunin, soleiðis at fyrstu venjingarnar í Sarajevo kundu fáast frá hondini, áðrenn spælt verður.

Eina mest mundi ráða um at fáa ferðamøðina nakað úr kroppinum, áðrenn spælast skuldi, men hartil gav hetta eisini møguleika at kunna seg um umstøðurnar í Vogosca-høllini, har allir dystirnir í kappingini verða spældir. Ein kunning, sum ivaleyst kemur væl við, tí í nógvar mátar livir høllin ikki heilt upp til teir standardir, sum føroyskir hondbóltsspælarar eru vanir við.

Hóast umstøðurnar, so tóktust venjararnir báðir vera nøgdir um, at mest sum allar av spælarunum tykjast vera púrasta klárar til dystirnar. Einastu ivamálini í løtuni eru Ása av Neystabø, sum hevur ein ferðil av krími, og Annika Ljósstein, sum hevur fingið bruna í tannkjøtið. Hon var í gjár á sjúkrahúsi og hjá tannlækna, har hon fekk viðgerð fyri brunan. Roknað verður við, at hon hvílir seg frá dystinum í dag.



# GITIÐ LEIKARAN

**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.



Vinnið fótbóltsupplivingina
Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS